# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1536.
# Tíðarskeið: 9/9-16/9 - 2015

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Lis Larsen, Jens Arni Thomassen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa, brosmu og longu.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski og mathøgguslokki varð selt til matstovuvinnuna í Havn. Nytrur vóru eisini tiknar av brosmu og longu. Nakrir agnhøgguslokkar vórðu tiknir til kanningar á Umhvørvisstovuni.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikukvøldið 9/9 kl 21:15. Tóku støðir hósdagin í norðara parti av bankanum, fríggjadagin djúpt vestanfyri og brúktu leygardagin, sunnudagin og mánamorgunin at taka støðirnar á tí grunna á bankanum. Løgdu at landi í Havn mánakvøldið kl. 19.15. Tað gekk sera væl í hond og veðrið var gott.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var bert eftir ætlan fyri hýsu (umleið 400). Vit fingu ov lítið av upsa til at náa ætlaða talið av nytrum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 17. september. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. desember.

**Fyribilsúrslit:** Tað var framvegis sera lítið av toski (Talva 1), bert 37 toskar í 29 hálum. Í fjør fingu vit 44 toskar. Vit fingu minni av hýsu, men meira av upsa í mun til í fjør. Magakanningarnar vístu, at tað var nakað til av bæði smáari og stórari nebbasild, meðan nøgdin av krabbdýrum var minni enn í fjør. Hitin við botn lá millum 8 og 10,5 gradir, sum er umleið ein hálv grad kaldari enn vanligt.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 1536 – yvirlitstroling á Føroyabanka.

| FISKASLAG | KG 2015 | Nytrur | Magar | KG 2014 | Lutfall |
|---|---|---|---|---|---|
| HAVMÚS | 2317.267 | | | 2328.333 | 1.00 |
| HÝSA | 1031.147 | 410 | 107 | 1387.082 | 0.74 |
| SVARTKJAFTUR | 545.450 | | | 114.787 | 4.75 |
| TOSKUR | 496.395 | 37 | 27 | 515.075 | 0.96 |
| UPSI | 469.415 | 118 | 48 | 146.230 | 3.21 |
| S. VIVIPARUS | 376.514 | | | 172.961 | 2.18 |
| GULLLAKSUR | 314.471 | | | 572.043 | 0.55 |
| LOLIGO | 254.770 | | | 208.937 | 1.22 |
| KNURRHANI | 243.473 | | | 1681.490 | 0.14 |
| GLÝSUFISKUR | 234.897 | | | 394.018 | 0.60 |
| LONGA | 188.135 | 24 | 2 | 164.560 | 1.14 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 121.496 | | | 87.812 | 1.38 |
| HAVTASKA | 96.539 | | 8 | 19.065 | 5.06 |
| SILVURMURTUR | 92.642 | | | 149.950 | 0.62 |
| SKRAMBUL | 82.275 | | | 58.780 | 1.40 |
| BROSMA | 45.350 | 10 | 4 | 26.910 | 1.69 |
| SKØTA (BATIS) | 32.090 | | | 15.765 | 2.04 |
| GLASKVOYSA | 28.831 | | | 10.291 | 2.80 |
| TUNGA | 25.474 | | | 22.640 | 1.13 |
| BLÁLONGA | 22.490 | 5 | 4 | 26.725 | 0.84 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 21.725 | | | 35.516 | 0.61 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 21.339 | | | | |
| NAGLASKØTA | 14.165 | | | | |
| SANDSPRØKA | 14.040 | | | 33.089 | 0.42 |
| GLÍGGJHÁVUR | 12.420 | | | | |
| REYÐI KNURRHANI | 12.194 | | | 6.132 | 1.99 |
| S. MARINUS | 11.910 | | | 57.260 | 0.21 |
| HVALSPÝGGJ | 8.695 | | | | |
| STREYMSILD | 7.863 | | | | |
| LÁLLA | 7.161 | | | | |
| LÍTLABROSMA | 5.836 | | | 19.952 | 0.29 |
| MAKRELUR | 4.305 | | | | |
| S. MENTELLA | 2.715 | | | | |
| FERBLETTUTA KVOYSA | 1.764 | | | 0.992 | 1.78 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 1.725 | | | 4.347 | 0.40 |
| ROSSAMAKRELUR | 1.279 | | | 0.380 | 3.37 |
| HAVNEBBASILD | 0.450 | | | 14.566 | 0.03 |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 0.425 | | | | |
| VØRPUSKEL | 0.410 | | | 0.284 | 1.44 |
| SILD | 0.209 | | | | |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 0.188 | | | | |
| NEBBASILD | 0.150 | | | 0.139 | 1.08 |
| HUMMARI | 0.135 | | | 1.246 | 0.11 |
| TRØLLAHUMMARI | 0.051 | | | | |
| TILSAMANS | 7170.275 | 604 | 200 | | |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum ”Tur1536d.doc”.

Petur Steingrund